

*Studentarnir savna inn undirskriftir í SMS um middagsleitið í gjár. Ikki stóð á at fáa fólk at skriva undir, og studentarnir løgdu fegnir rygg til enn eina undirskrift*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Savna undirskriftir móti sparingini

**Studentarnir í 2. A í Hoydølum vilja ikki góðtaka at teirra flokkur verður niðurlagdur. Tey savna nú inn undirskriftir móti sparinguni og hava haraftrat biðið um alment innlit í málið**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hoydalar:** - Hey, vilt tú ikki skriva undir hetta mótmælið móti sparingunum á skúlaøkinum?

Fyrrapartin í gjár vóru m.a. næmingar í 2. A í Hoydølum úti og savnaðu inn undirskriftir móti teim sparingunum, sum fara at raka teirra flokk so meint.

Í Sosialinum í gjár skrivaðu vit um støðuna millum næmingarnar í hesum flokkinum, sum komandi skúlaárið verða splittaðir sundur í tríggjar flokkar, tí at teirra egni flokkur skal niðurleggjast.

Hetta ætlaðu tey ikki at lata sær lynda uttan stríð, og nú er fyrsta stigið á hesi leiðini tikið.

Tað vóru tó ikki bert næmingar í Hoydølum, sum vóru úti í hesum ørindum, tí hetta sama gjørdi eisini næmingar í Vági og í Kambsdali.

### Lærarar stuðla

Um middagsleitið í gjár vóru tey stødd í SMS í Havn, har tað ikki stóð á at fáa fólk at skriva undir.

Frammanundan høvdu tey verið á fýra skúlum í Havn í somu ørindum, og har var sera góð undirtøka fyri at stuðla mótmælisskrivi teirra.

Tey høvdu tá verið á Tekniska skúla, Handilsskúlanum, Sjómansskúlanum og Maskinmeistaraskúlanum, har so at siga allir næmingarnir skrivaðu undir mótmælið.

Næmingarnir kundi eisini fegnast um, at fleiri lærarar eisini hava tikið undir við mótmælinum.

Arbeitt verður nú víðari við hesum endamálinum, og í morgin er so ætlanin at allar hesar undirskriftirnar úr Havn, Vági og Kambsdali skulu handast til mentamálaráðharran, Jógvan á Lakjuni.

### Alment innlit

Samstundis við innsavningina av undirskriftum hevur 2. A í Hoydølum biðið um alment innliti í hetta málið. Tey biðja í hesum brævinum, til Petur Petersen, aðalstjóra, um innlit í alt skrivligt samskifti sum hevur verið um hetta málið.

Tey biðja somuleiðis um fundarfrásagnir og notatir um málið, um telefonnotatir og onnur skjøl, sum liggja sum grund fyri avgerðini at niðurleggja flokk teirra, 2. A.

Brævið er dagfest 25. mai, og tí eiga hesi skjølini at verða útflýggjað í seinasta lagi 10 dagar seinni – t.v.s. 3. juni, sum er fríggjadagin í næstu viku.

# Pool er kul millum tey ungu

**– Eg satsi ikki uppá annan ungdóm enn tann, sum er her í Fuglafirði. Men øll eru sjálvandi vælkomin higar, sigur Hallur Poulsen, sum í farnu viku lat upp nýtt spælistað í Fuglafirði**

SPÆLISTAÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Hetta er væl kent í øðrum støðum, og nú er tað so eisini komið til býar í Fuglafirði.

Í farnu viku læt nevniliga upp eitt nýtt spælistað, har tey ungu nú hava fingið møguleika at spæla nøkur av somu spølum, sum javnaldrar teirra kenna í øðrum londum.

Tað var ikki neyðugt at lýsa stórvegis við ætlanini, tí ikki gekk long tíð fyrrenn hesi tíðindini fóru at ganga sum rótasúpan í býnum.

Hóast spælistaðið bert hevur verið opið í eina viku, er longu líkt til, at eigarmaðurin, Hallur Poulsen kann vera nøgdur við undirtøkuna.

- Jú, her hevur verið rættiliga nógv fólk, og tí síggi eg ljóst uppá framtíðina, sigur Hallur.

### Góð spøl

Fyri at lýsa hetta spælistaðið kann tað gerast við bert fáum orðum: Hetta skal vera eitt stað, har fólk kunnu koma saman fyri at hugna sær.

Innkomin í spælihøllina er alt gjørt klárt til at hetta endamálið kann fremjast. Har finnast í fyrsta lagi fýra snøgg pool-borð, og inni í einum øðrum høli er eitt fótbóltsspæl, og eitt serstakt spæl, sum teim ungu dáma serliga væl.

Hetta er eitt rættiligt airhockey spæl, sum í ein ávísan mun minnir um tey vanligu ís-hockey spølini, men har alt verður drivið fram við luft.

Og tað hevur eisini víst seg, at júst hetta spælið er longu vorðið sera væl umtókt millum tey ungu, hóast stutt tíð er fráliðin síðani spælistaðið læt upp.

### Ikki lýst

Hallur hevur arbeitt við hesi ætlanini í eina tíð, men avgjørdi so at lata upp týsdagin í farnu viku.

Hann hevði ikki lýst við tí, men hetta serstaka hølið varð skjótt gjørt til prát manna millum – og serliga millum ungdómin í býnum.

Tá hann so lat upp varð beinanvegin stór undirtøka, og tá Sosialurin prátaði við Hall fríggjadagin í farnu viku, var hann sera fegin um, hvussu nógv fólk longu høvdu verið inni á gólvinum.

Hallur var tí spentur eftir at vita, hvussu undirtøkan fór at verða framyvir – um hetta bara var eitt upplop, ella um spælistaðið veruliga hevur rakt ein tørv hjá teimum ungu í Fuglafirði.

– Eg satsi ikki uppá annan ungdóm enn tann, sum er her í bygdini. Men øll eru sjálvandi vælkomin higar, sigur hann.

### Riggar aðrastaðni

Ein viðkomandi spurningur er tí eisini, hví Hallur er farin undir júst eitt slíkt spælistað í Fuglafirði.

– Hví ikki í Fuglafirði?! Eg meini so við, - her búgva væl omanfyri 1500 fólk. Alt er væl savnað her, og stutt er at fara til øll støðini í býnum.

– Hetta er jú ikki nakað nýtt, og tað sær út til at rigga á øðrum støðum. So hví ikki eisini her?, sigur ein sera bjartskygdur Hallur.

Inni í spælistaðnum er eisini ein lítil kiosk, har til ber at keypa nakað av tí, teimum ungu dáma væl at eta og drekka.

### 13 til 15 ár

Eitt slíkt spælistað sum hetta vendir sær sjálvandi mest til tey ungu.

Og Hallur hevur eisini lagt merki til, at tað serliga er ein ávísur aldursbólkur sum hevur vitjað spælistaðið.

– Tað eru serliga tey 13 til 15 ára gomlu, sum eru komin her og eisini onkur eldri.

– Alt er sjálvandi so nýtt enn, so tað er trupult at siga, um tað eisini verður soleiðis framyvir, sigur hann.

Hóast tey ungu serliga hava tikið væl ímóti spælistaðnum, so er einki til hindurs fyri hjá eldri ungdómi og øðrum at vitja staðið.

### Einki navn

Nýggja spælistaðið í Fuglafirði er so nýtt, at tað enn ikki hevur fingið nakað navn.

Á mannamunni eitur tað bert "Spælistaðið", meðan onkur kallar tað fyri "Grand Floor", eftir handlinum sum áður helt til í bygninginum.

Hallur sigur tó, at navnið Grand Floor ikki beinleiðis sipar til, at her er eitt spælistað, men hann hevur sum so einki ímóti navninum.

– Fyri meg kann tað gott eita so, sigur Hallur.



*– Tað eru serliga tey ungu millum 13 og 15 ára sum koma í spælistaðið, sigur Hallur Poulsen*

Mynd: Bárður